# Skeivt at friða ísbjørnina

Ætlanin hjá amerikonsku myndugleikunum at lýsa ísbjørnina sum eitt av teimum hóttu djórasløgunum møtir stórari mótstøðu millum inuittarnar í Kanada. Sambært The Times halda inuittarnir, at tað er ikki teirra veiða, sum hóttir ísbjørnina, men heldur avleiðingarnar av veðurlagsbroytingunum. Sambært blaðnum er amerikanska stjórnin undir stórum trýsti frá felagsskapum sum Greenpeace, sum vilja hava ísbjørnina friðaða allastaðni.

# Ørnirnar doyðu

Í fjør vórðu tvær havørnir fluttar úr Noregi til Írlands í einari roynd at menna stovnin av nýggjum, men vanlukkutíð doyðu báðar. Nú eru løgreglan og fuglafrøðingar farin undir at kanna orsøkina, skrivar Reuters. Havørnin helt til í Kerry-økinum har suðuri í Írlandi fyrr, men hon doyði út fyri umleið hundrað árum síðani. Í Írlandi hava fleiri illgruna um, at bøndurnir í Kerry hava beint fyri teimum báðum ørnunum, sjálvt um ørnin er friðað.





*13 ára gamla Marta Øre hevur fingið góða hjálp í Danmark. Her er hon avmyndað við kettuni hjá sær, sum eitur Kisan.*
*- Hon er ein glað og vælnøgd genta í dag, sigur mamma hennara*

Marta hevur ADHD:

# Fekk on

**Í sjey ár bíðaðu Marita og Páll Sigvald Øre úr Fuglafirði eftir eina diagnosu til dótrina, sum hevði atferðartrupulleikar. Danskir serfrøðingar staðfestu ADHD í 2004. Tá familjan varnaðist, at ongin hjálp var at fáa í Føroyum, gjørdu tey av at flyta alla familjuna til Danmarkar. – Tá hevði Marta verið offur nóg longi. Dóttur okkara hevði meira at siga enn føroyska samfelagið, sigur Marita Øre**

SERLIGUR TØRVUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@mail.djh.dk*

**Solbjerg, Århus:** Barnalátur hoyrist úr einum kamari. Tveir dreingir spæla Play Station. Teir eita Esmund og Sigfríður, og teir eru 11 og 8 ára gamlir.

Mamma teirra, Marita Øre, setur vørur upp á pláss í køkinum, meðan kettan, Kisan, melur runt í stovuni. Pápi teirra, Páll Sigvald, er sjómaður, so hann er ikki heima.

Ein púra vanlig familja – føroysk familja – sum hevur valt at búseta seg nakað sunnan fyri Århus, tí føroyska samfelagið ikki hevði nakað nøktandi tilboð til fimta limin í hesi familjuni. Marta Øre.

Hon er ikki komin heim úr skúlanum enn.

Marta gongur á serskúla fyri børn við ADHD.

Meðan Marita greiðir frá, hvussu dagurin hongur saman, gongur hurðin. Marta er komin til hús. Kisan fer rennandi ímóti henni. Samstundis sum Marta setur skúlataskuna niður á gólv, tekur hon kettuna upp og klemmar hana.

- Hetta er heimsins fittasta ketta, sigur Marta og brosar.

## Gentan er øðrvísi

Marta er fyrsta barnið hjá Maritu og Páll Sigvald Øre. Tá hon var um tvey ára aldur, varnaðust tey, at tað ruggaði ikki heilt rætt við dótrini.

Og tá byrjaði stríðið við at finna útav, hvat bagdi henni. Sjey ár seinni varð tað endiliga staðfest, hví Marta Øre var øðrvísi. Hon hevði ADHD.

Sjey ár, har foreldrini royndu saman við myndugleikunum í Føroyum at finna útav, hvat bagdi Martu. Uttan úrslit.

- Hetta var ein strævin tíð. Vit vistu ikki, hvat henni bagdi, hvat henni tørvaði og vit máttu bara taka ein dag í senn, sigur Marita Øre og yppir øksl.

Marta dugdi ikki at spæla við onnur børn. Ofta bleiv hondfast millum hana og onnur børn, og av tí at hon ikki var før fyri at seta seg í støðuna hjá øðrum, var hon rættiliga ógvuslig. Til endans var tað ovboðið á dagstovninum, sum Marta gekk á. Um hetta mundið var Marta fimm ára gomul.

- Hon slapp ikki at ganga har meira. Tey maktaðu hana ikki, sigur Marita og fjalir ikki út yvir, hvussu lítið hon heldur um, at gentan varð blakað út úr barnagarðinum, sum hon málber seg sjálv.

- Tað var ein "fallitерklæring," haldi eg.

## Frægari í skúlanum

Tá Marta fór í skúla, merktu foreldur hennara ein bata hjá henni, men tað var bert í eina stutta tíð, tí Marta fekk framvegis ikki ta hjálp,